

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 11 - 2011

# Statoil selt gassleiðir fyri 9 milliardir

Fyri at fáa pengar til leitingar á øðrum leiðum hevur Statoil selt seg út av fimm leiðum og partar av trimum leiðum í Norðsjónum fyri tilsamans 9,3 milliardir norskar krónur. Keypari er bretska orkufelagið Centrica. Tey bæði feløgini hava gjørt eina avtalu um, at Centrica skal keypa gass frá Statoil fyri 100 milliardir krónur í árunum frá 2015 til 2025. Tann nýggja avtalan kemur ístaðin fyri eina avtalu, sum feløgini hava havt síðani 2002, og sum fer úr gildi í 2015. Ognarpartarnir, sum Statoil hevur selt, umfata gassframleiðsluna á leiðunum Kvitebjørn, Valemon, Fulla, Vale, Skirne og Heimdal umframt oljuleiðirnar Frigg-Gamma-Delta. Statoil sigur í tíðindaskrivi, at handilin gevur felagnum betri møguleikar at halda fam við útbyggingini á norskum øki.